# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Make-up skeið

Frisørdeildin á Tekniska skúla

### Make-up skeið - modul I

**Málbólkur**
Skeiðið er ætlað øllum, ið ynskja at læra at leggja make-up.

**Endamál**
Endamálið við skeiðnum er, at luttakarin lærir at brúka tey røttu amboðini og vøruna til at leggja dag- og kvøld make-up.
Arbeitt verður við grundleggjandi vitan um litlæru og húðasløgum og at læra um ymisk sløg av vørum, ið verða brúkt til at leggja dag- og kvøld make-up.

**Mánakvøld - Dag make-up - kl. 19.00-22.00**
Arbeitt verður við støði í litlæruni at leggja vanliga og náttúrliga dag make-up.

**Týskvøld - Kvøld make-up - kl. 19.00-22.00**
Arbeitt verður við støði í litlæruni at leggja vanliga og náttúrliga kvøld make-up.

### Make-up skeið - modul II

**Málbólkur**
Skeiðið er ætlað øllum, ið hava eina grundleggjandi vitan innan make-up og ynskja at arbeiða víðari við hesum.

**Endamál**
Endamálið við skeiðnum er, at luttakarin lærir at brúka tey røttu amboðini og vøruna til at leggja brúðar make-up og smokey eyes make-up.
Arbeitt verður við grundleggjandi vitan um litlæru og húðasløgum og at læra um ymisk sløg av vørum, ið verða brúkt til at leggja dag- og kvøld make-up.

**Mánakvøld - Brúðar make-up - kl. 19.00-22.00**
Brúðar make-up skal verða tíðarleys og natúrlig, samstundis sum hon hóskar til typu, klæðir, bukett v.m.

**Týskvøld - Smokey eyes make-up - kl. 19.00-22.00**
Arbeitt verður við ymiskum nútíðar make-up á eygunum við úttónaðum litum og kantum.

| | |
|---|---|
| **Modul I:** | 7. og 8. mai 2007 |
| **Modul II:** | 14. og 15. mai 2007 |
| **Skeiðshaldarar:** | Sunneva Thorsteinsson og Unn Zachariassen |
| **Stað:** | Tekniski skúlin í Smiðjugerði, Frisørdeildin |
| **Kostnaður:** | Kr. 1.500,00 fyri hvørt skeiðið |
| **Tilmeldingarfreist:** | 23. apríl ella so leingi pláss er eftir |

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

TEAM 85

## Føroya Studentaskúli og HF-skeið

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Tel 312973 · fax 318624

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2007 at rokna 2-4 føst størv leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaraðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Søkt verður eftir lærarum við eini samanseting av hesum lærugreinum:

**filmur/sjónvarp, heimspeki, føroyskt, lívfrøði, spanskt, støddfrøði og teldufrøði.**

Harumframt eru **14-16 ársvikariat** í lærugreinunum:

**alis/evnafrøði, alisfrøði, danskt, enskt, evnafrøði, franskt, føroyskt, geografi, ítróttur, latín, lívfrøði, sálarfrøði, samfelagsfrøði, spanskt, støddfrøði, søga og týskt.** (møguliga saman við eini av lærugreinunum sum nevndar eru undir føstu størvunum)

Eitt ávíst tímatal er leyst til umsitingarleiðslu og kunnu søkjast saman við undirvísingartímum.

Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2007. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á góð samstarvsevni og at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir

Gjørt verður vart við tveyárasáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin rindar kostnaðin hjá umsøkjaranum fyri flyting og ferð fram og aftur millum verandi bústað og Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin - gevið gætur - upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaðir kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo

Umsókn á oyðublaði frá YF ella frá GL verður stílað og sent til

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið,**
**att.: Mikkjal N. Helmsdal, rektari,**
**Hoydalar, FO – 188 Hoyvík, Føroyar**

í seinasta lagi 30. apríl 2007.

Avrit av próvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.










## Bakaríið hjá Jórun

Søkt verður eftir einum bakarasveini og einum lærlingi skjótast gjørligt.

Áhugaði kunnu venda sær til Jórun á tlf. 215414

Bakaríið Hjá Jórun

**Klingrugarður 6 | 700 Klaksvík**
**Tel. 455314 | www.jorun.fo | jorun@jorun.fo**

Lesið Sosialin -tað loysir seg

## »Sólsetur«

blað teirra eldru fæst ókeypis á Statoil støðum, Shell støðum, keypssamtøkum og øðrum handlum kring landið.

LANDSFELAG PENSJÓNISTA